

Ocean Vanguard. Mynd: Harald Pettersen - Statoil

# Statoil fekk nokk - Diamond Offshore pakkar saman í Noregi

**Jógvan Hugo Gardar**

18.09.2014 - 09:03

Oljan.fo

Skrivstovan hjá Diamond Offshore, ið eigir fleiri boripallar, er við at verða pakkað saman í Noregi. Felagið gevst við virkseminum í Noregi aftaná at Statoil segði upp eina leiguavtalu av einasta boripallinum hjá Diamond í Noregi. Hetta veit offshore.no at siga.

Tað var í juni at Statoil boðaði frá at tey høvdu sagt upp leiguavtaluna. Onki bleiv sagt um hvat sum var orsøkin, men sambært offshore.no var Statoil ikki nøgt við allar trygdarloysnirnar á boripallinum Ocean Vanguard.

Statoil hevði annars leigað boripallin til februar 2015 fyri 454.000 dollarar um dagin. Greitt er í løtuni ikki um Diamond Offshore velur at stevna Statoil ella ikki, men Diamond Offshore meinar at Statoil skyldar teimum kanska so nógv sum 670 milliónir norskar krónur